– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Nýggj og frálík hús í Miðvági

**Nýggju arkitektteknaðu og væl bygdu húsini eru sera livilig og orkusparandi.**









## Umhvørvið

Tú koyrir gjøgnum bygdina til nýggju rundkoyringina og sneiðir inn á vegin niðan til nýggja familjuvinaliga býlingin í Miðvági. Í náttúruvakra og veðurgóða umhvørvinum finnur tú hugnaligu og barnavinaligu gøtuna, við tí góða grannalagnum. Har er frálíkt útsýni yvir bygdina og fjørðin, og sparkivøllur og spælipláss er beint við. Stutt er oman í bygdina til nýggja dagstovnin, skúlan, ítróttarøkið og handlarnar.

## Uttanum

Alt tað stóra stykkið er grivið út og planerað, so tað er sera lætt at byggja garð, tilbygningar og garagu, um tørvur er á tí. Beint uttanfyri úthurðina er stórt útigólv / terassa, ið vendir móti góða sólarganginum, og vinkulrættu lonirnar geva gott læ.

## Snið, stílur og dygd

Húsini eru bygd, so tey hóska sera væl til landslagið og umhvørvi, og so eru tey eitt av fáu ektaðu 1-planshúsunum í landinum. Her er alt í einari hædd – sera lætt at halda og gott at liva í. Húsini eru klødd við breiðum brettum, ið undirstrika vakra sniðið og arkitekturin. Inni er alt nýtt og ljóst, vakurt og fjálgt. Alt er gjørt eftir nýggjasta byggihátti úr besta tilfari við besta handverki.

Húsini eru sera væl bjálvað, og orkan kemur frá einari sjálvvirkandi hitapumpu (luft til vatn), so nýtslan er sera lítil, sjálvt um húsini eru stór og við stórari flatu. Gólvhiti er allastaðni, so eingir radiatorar misprýða rúmini, og tú kennir teg altíð heitan, sjálvt um rúmhitin ikki er so høgur.

Øll rúmini eru stór, so húsini virka sera rúmsátt. Góða rúmuppbýtið og góði samanhangurin millum rúmini gera tey sera livilig og løtt at halda. Her kunnu øll vera saman og tó fáa frið fyri hvørjum – alt eftir tørvi, eins og størri og minni veitslur kunnu verða hildnar, tá ið høvi býðst. Stórt ovastaloft er at goyma og stúva í, er tørvur fyri meira plássi til tess.

## Innrætting

Stórt útigólv, inngongd, hall, gestawc, køkur / alrúm, bryggers / vaskirúm við egnari inngongd, borðsstova / stova, millumgongd, hjúnarrúm, baðirúm og 3 kømur. Hartil er ovastaloft og krúpikjallari. Møguleiki er fyri at byggja til við hurð frá verandi bygningi.

## Fakta

**Adressa** .............Rasmussargøta 5, Miðvágur
**Byggiár:** ..............2007
**Hæddir:**...............1
**Gólvvídd:**.............162 m²
**Grundøki:**............756 m²
**Hjallur:** ................møguleiki at byggja
**Bilhús:** .................møguleiki at byggja









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**